# Fleiri partar fløkja samráðingarnar

**Vit hava roynt at verið tolin. Men samráðingarnar eru alt ov tilvildarligar og óskipaðar. Hetta góðtaka vit ikki longur, og tí var breið semja um at leggja arbeiðið niður í eitt samdøgur, sigur ein avgjørdur Jarvin F. Hansen, formaður í Pedagogfelagnum**



ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fekst tú gummistivlarnar hjá barninum heim við í gjár? Um ikki, so mugu tit bíða til mánadagin, um barnið gongur á dagstovni. Og um tit eru brúkarar av einum frítíðarskúla, mugu tit bíða til aftaná heystfrítíðina.

Tí, nú kann tað vera nokk! Tað søgdu tey 120 álitisfólkaumboðunum, sum Pedagogfelagið hevði fund við í gjár. Og arbeiðssteðgur varð lýstur at vera í eitt samdøgur, frá hóskvøld á midnátt til fríggjakvøld á midnátt.

– Føroya Pedagogfelag vil á hendan hátt mótmæla gongdini í sáttmálasamráðingunum, ið nú hava vart í eitt ár. Og serliga er tað vantandi viljin hjá politikarunum, at vera við til samráðingarnar, og teirra manglandi útgreining av teirra ætlanum, ið liggur til grundar fyri hesi avgerðina, sigur Pedagogfelagið.

### Eitt ár er farið

– Vit hava ligið í sáttmálaloysi síðani 1. oktober í fjør, tá vit gjørdi av at uppsiga sáttmálan. Og avgerðin um at uppsiga sáttmálan var júst tengd at, at vit ynsktu at fáa nakrar, fyri okkum, týðandi broytingar inn í hann, sigur Jarvin F. Hansen. Og hann vísir á, at tey tá skutu upp, at leingja sáttmálan í eitt ár, men at hetta hevði mótparturin ongan áhuga fyri.

– Við at fáa eitt ár at arbeiða í, hevði tað givið okkum rúmd og luft til møguliga at farið til samráðingarborðið aftur saman við onkrum av teimum stóru feløgunum, men hesum var mótparturin als ikki áhugaður í, sigur formaðurin í Pedagogfelagnum.

### Ikki við tveir partar

Pedagogfelagið samráðist bæði við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, av tí at landið varðar av serstovnaøkinum, og kommunurnar varða av dagstovnaøkinum.

– Vit fara ongantíð at samstarva við tveir partar aftur, tí tað hevur verið ómetaliga tungt og møtimikið. Ikki minst tí, at tað tykist sum, at KAF als ongar heimildir hevur fingið frá kommununum, so hvørja fer vit eru komin til eina niðurstøðu, kunnu samráðingarumboðini ikki taka nakra støðu, men skulu venda sær til kommunurnar at spyrja seg fyri, sigur Jarvin F. Hansen. Og hann fýlist harðliga á, at samráðingarnevdirnar hjá mótpartinum hava ongar heimildir, og at ongin við politikari møtir upp.

### Ein undirmett statt

Felagið sigur seg fleiri ferðir hava víst á, at nú dagstovnalógin er broytt, og nýggj kunngerð sett í verk, førir tað við sær størri ábyrgd og orku fyri starvsfólk á stovnunum.

– Vit meta broytingina sum eina kollvelting innan økið, og vit ynskja, at allir pedagogar fáa fimm tímar um vikuna til fyrireiking, eins og lærarar fáa niðurskurð.

Spurdur, hvørjar avgerandi broytingar innan pedagogiska øki gera, at allir pedagogar skulu hava fimm tímar til fyrireikingar, vísir Jarvin F. Hansen til nýggju dagstovnalógina.

– Tann størsta broytingin í nýggju dagstovnalógini er grein fimm, sum áleggur kommunum at umsita stuðulsskipanina til børn við serligum tørvi, í staðin fyri, sum higartil, at Almannastovan hevur røkt ta uppgávuna. Og av tí at kommunurnar hava so ymiskar politikk á økinum eru í dag nógvir dagstovnar við stuðulskrevjandi børnum, sum ongan stuðul hava, sigur Jarvin F. Hansen.

Og hann vísir á, at krøvini til starvsfólkini eru herd og broytt nógv seinastu árini, har tað eitt nú er eitt krav, at hvør stova skal hava eina virkisætlan og gera eftirmetingar.

– Í kjalarvørrinum á Pisa-kanningunum er eisini nógv sum týður uppá, at vit framyvir skulu hava eina virkisætlan fyri hvørt barni, so tey verða fangað fyrr, um tey hava tørv á ávísum tilboðum.

– Vit ynskja, at normeringarnar fara upp og at hvør pedagogur fær fimm tímar til fyrireiking um vikuna. Harumframt ynskja vit eina munandi lønarhækkan, og vit skjóta upp at allir pedagogar verða løntir sambært serstovnasáttmálanum, so teir fara eitt gott vet upp á lønarstiganum, sigur Jarvin F. Hansen, sum heitir á kommunurnar, um at fara væl við pedagogunum, um tær ynskja at varðveita teir.

– Tí tað er eingin loyna, at pedagogar lønarliga eru ein undirmettir stattur, sigur Jarvin F. Hansen.

### Uttanumtos

Og hann vísir á, at samstundis ætlar Fíggjarmálaráðið at avtaka tænastumannasetanir, uttan at stundir eru til at viðgera hesar umfatandi broytingar.

– Hetta gjørdist greitt, tá ið felagið sendi skriv til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið, har vit løgdu fram uppskot til eina ítøkiliga semju. Heldur enn at taka støðu til uppskot okkara, fingu vit ikki annað frá KAF og FMR enn burturforkláringar og uttanumtos, sigur Pedagogfelagið.

# Skápini skulu skrúvast føst

**Tórshavnar kommuna fer at eftirkanna allar stovnar í kommununi. Skáp og annað, ið er í vanda fyri at detta, skal skrúvast fast í veggin**

DAGSTOVNAR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Mánadagin hendi eitt óhapp í Barnagarðinum við Velbastaðvegin, har ein 5 ára gamal smádrongur fekk eitt tungt skáp omanyvir seg.

Óhappið hendi, tá drongurin klatraði upp eftir skápinum, sum ikki var skrúvað fast í veggin.

Ein umbygging er farin fram í Barnagarðinum við Velbastaðvegin seinastu tíðina, og hóast nógv smáting vóru eftir at fáa upp á pláss, eru nýggju barnagarðsstovurnar tiknar í nýtslu.

Í gjár hevði Tórshavnar býráð fund um støðuna har avgjørt var, hvat skal gerast fyri at rætta brekini í Barnagarðinum við Velbastaðvegin.

– Vit fara at gera manglistar, og fáa rættað manglarnar beinanvegin. Og vit fara eisini at syrgja fyri, at alt sum kann koppa skal skrúvast fast, sigur Heðin Mortensen borgarstjóri.

Kommunan hevur eisini givið boð um, at allir stovnar í kommununi bæði barnagarðar og skúlar skulu eftirhyggjast, so at sleppast kann undan, at skaðar sum hesin henda aftur.

– Húsavørðirnir hava fingið boð um, at alt, sum kann vera í vanda fyri at detta, skal skrúvast fast, so sum skáp, reolir, køliskáp, sigur Heðin Mortensen, og hann heldur fram:

– Tá tað skal gerast á hesum stovninum, so hava vit gjørt av, at tað skal gerast á øllum stovnunum. Vit hava valt eisini at gera tað á skúlum, tí skúlabørn kunnu eisini finna uppá at klatra á skápum, og tí haldi eg at tað er natúrligt at vit gera hetta.

# Bíða bara eftir fundarboðum

**Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið siga tað vera undranarvert, at Pedagogfelagið lýsir arbeiðssteðg, heldur enn at koma til samráðingarborðið.**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú Føroya Pedagogfelag hevur lýst 24 tíma verkfall, er arbeiðsgevarasíðan komin við nøkrum viðmerkingum.

– Vit hava verið í samráðingum við Føroya Pedagogfelag síðan í desember í fjør og av krøvunum frá arbeiðsgevarunum er bara eitt eftir á borðinum, og nú sigur felagið, at Fíggjarmálaráðið ætlar at avtaka tænastumannasetanir, uttan at geva sær og okkum nóg góðar stundir til at viðgera hesar umfatandi broytingar. Í hesum umfari hevur felagið vitað um kravið í 9 mánaðir, og tá ið tað hevur verið ført fram áður, kann tað undra, at felagið sigur seg ikki hava havt stundir at viðgera tað, siga Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

### Hava tosa við politikarar

Og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vísa á, at felagið vísir til, at vantandi viljin hjá politikarunum at vera við til samráðingarnar er ein onnur grund. - Í juni sleit felagið samráðingarnar við hesu somu grundgeving, og kom tá á tal við politikararnar. Síðan tað hava samráðingarnar hildið áfram við embætisfólkum, sum vanligt er í øllum øðrum sáttmálasamráðingum, sigur arbeiðsgevarasíðan.

– Felagið sigur um broytingar í dagstovnalógini, at tað metir broytingina sum eina kollvelting innan økið. Men Kommunala Arbeiðsgevarafelagið sær als ikki sær ta stóru broytingina í nýggju dagstovnalógini.

### Komið til borðið

Og arbeiðsgevarasíðan vísir á, at Pedagogfelagið sigur seg hava sent uppskot til ítøkiliga semju, sum Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ikki hava tikið støðu til, men bara eru komin við burturforkláringum og uttanumtosi.

– Tílík skriving førir ikki til nakað gott, og tí fara vit ikki alment at gera viðmerkingar til hetta uppskot. Vit fara bara at endurtaka: Samráðingar eiga at fara fram við samráðingarborðið, ikki umvegis teldupostar og ikki umvegis fjølmiðlarnar.

Tað er undranarvert, at felagið lýsir arbeiðssteðg heldur enn at koma til samráðingarborðið, tí vit bíða bara eftir fundarboðum, siga Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.